# Tvær boringar við markið í summar

**Nú meðan stórir partar av vinnulívinum liggja í andaleypi kunnu tvær nýggjar boringar við markið koma at skapa nýggja optimismu fyri framtíðar oljuvinnu á Atlantsmóti og harvið eisini Føroyum**

OLJULEITING
*Jan Müller*




*Pílarnir á kortinum vísa, hvar teir báðir brunnarnir skulu borast í summar. Annar er í í loyvi 204/9 & 10, har feløgini Amerada Hess, ChevronTexaco, Dong og OMV raktu við olju í boring (Cambobrunnurin) nakað herfyri. Talan verður helst um ein avmarkingarbrunn ella møguliga ein nýggjan leitingarbrunn. Hin brunnurin skal borast longur norðari, beint norðan fyri 61 stig, í loyvinum 213/26& 27*

Norska felagið Smedvig, sum saman við Statoil eigur boriskipið West Navigator, (fyrr West Navion) hevur skrivað undir fyribils avtalu um at bora tveir brunnar skamt frá føroyska markinum. Annar brunnurin er fyri risastóra oljufelagið ChevronTexaco og hin er fyri eitt samtak, har Amerada Hess er fyristøðufelag. Undirskrivað er "Letter of intent", har feløgini hava bundið seg til at leiga hetta heimsins best útgjørda boriskip í 70 dagar frá fyrst í juni í ár fyri 15 mill. dollarar. Hetta kunnu vit m.a. lesa á heimasíðuni hjá Smedvig.

Tað er greitt, at hesar báðar boringarnar koma sera sera væl við hjá øllum teimum, ið vilja síggja framstig í leitingini eftir olju á Atlantsmótinum, sum Føroyar eru ein týðandi partur av. Uttan hesar báðar boringarnar hevði als eingin boring verið á øllum Atlantsmótinum í ár. Nú fáa vit tveir brunnar, sum báðir liggja heilt tætt upp at føroyska markinum. Annar brunnurin er longur norðuri og har er tað ChevronTexaco, sum er fyristøðufelag. Stjórin fyri leitingini hjá felagnum segði við Sosialin herfyri, at teir sóu fram til at fara undir at bora og vóru í samráðingum við eitt stórt oljufelag, sum arbeiðir á føroyaøkinum eisini. Nú er helst líkt til, at hetta felagið er farið saman við ChevronTexcao og OMV um at bora henda brunnin. Hin brunnurin er tann sokallaði Cambobrunnurin. Hesin var boraður fyri eini tíð síðani og vísir seg at vera eitt fund. Nú verður so ein avmarkingarbrunnur boraður fyri at vita, um fundið er lønandi. Tað er Amerada Hess, sum er fyristøðufelag, men eisini feløg sum Dong eru við í brunninum umframt ChevronTexaco.

Tað er greitt, at hesi báðir brunnarnir kunnu koma at hava sera stóra ávirkan á alt økið. Hóast teir verða boraðir í brestkum øki, so liggja teir beint uppat føroyska markinum og nettup í einum øki, sum føroyingar ætla at bjóða út í 2. rundu seinni í ár. Tvs. at um úrslitið av boringunum verður positivt kann tað fáa sera stóran týdning fyri áhugan fyri 2. rundu á landgrunninum. Og tann sannroynd at teigarnir, sum verða bodnir út í 2. Rundu, liggja nærhendis boringunum í summar á bretskum øki, er tí eisini av alstórum týdningi fyri framtíðar leiting við Føroyar. Stjórin í ChevronTexaco segði við Sosialin í januar mánað, at teirra boring í bretskum øki nær markinum kundi fáa stóran týdning fyri ætlan teirra at vera við í eini nýggjari rundu við Føroyar. Teir síggja nevniliga økini báðumegin markið sum áhugaverd og vilja gera íløgur her.

Nú naggatódn hevur verið í oljuleitingini við Føroyar leingi kunnu hesi tíðindini av álvara fara at seta ljóskastaran aftur á alt økið og geva bæði oljufeløgum og myndugleikum ta neyðugu optimismuna, sum kanska hevur manglað í eina tíð. Eitt ella tvey fund við markið í summar vilja heilt givið virka sum ein katalysator fyri alla oljuleiting á Atlantsmótinum. Fund ella ikki – so vilja upplýsingarnar frá tveimum brunnum so tætt upp at markinum og nærhendis komandi útbjóðing á okkara landgrunni, verða sera týðandi sum referanca tvs. at vitanin frá hesum brunnum kann koma væl við, tá farið verður eftir at fyrireika okkara egnu útbjóðing nærhendsi.

Vit skulu eisini minnast til, at onnur av boringunum í summar snýr seg um at staðfesta, um eitt longu gjørt fund er lønandi.

Í august ella september í ár fáa vit so at vita, hvat flaggskipið í boriflotanum, West Navigator hevur funnið fram til. Verður eitt lønandi oljufund staðfest so tætt við føroyska markið tá, so fer tað uttan iva av álvara at seta Atlantsmótið aftur á altjóða oljukortið.



*West Navigator, sum skal til at bora tveir brunnar skamt frá føroyska markinum í summar*



Nýggj ferðaskrivstova

Nú fær Eysturoyggin sína egnu ferðaskrivstovu



Mikudagin, 18. februar 2004, letur ferðaskrivstovan Novena Tours upp omanfyri Statoilstøðina í Saltangará.

Novena Tours selur allar ferðaseðlar og fyriskipar allar ferðir, bæði fyri einstaklingar og bólkar, - til kappingarførar prísir, - men við einari tænastu, sum er munandi betri.

Til ber at luttaka í tveimum kappingum, har vinningarnir eru tvær ferðir, - báðar fyri tvey, ein við Maersk Air og ein við Atlantic Airways.

Kappingarnar verða til fríggjadagin 20. februar.

NOVENA TOURS

FO-600 Saltangará · Boks 161 · Tel 47 4800 · Fax 47 4801
info@novenatours.com · www.novenatours.com

Leikur 1
MAERSK AIR
Kom inn á gólvið hjá okkum og git um, hvussu nógvir lego-klossar eru í Maersk Air flogfarinum?

Leikur 2
ATLANTIC AIRWAYS
Kom inn til okkara við rætta svarinum uppá spurningin: Hvussu nógv flogfør eigur Atlantic Airways - 2, 5, ella 10?

KREA.FO · TEL 44 93 39



# Týr í Føroyum og á veg út í heimin

**Nógv er fyri framman hjá Týr. Føstulávintskonsert í Føroyum, festivalir í Týsklandi og Russlandi, og Týr hevur eisini fingið boðið sín fyrsta heimsumfevnandi license-sáttmála**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



Bólkurin Týr hevur strevast fyri at náa út um landoddarnar. Væl gekk í Íslandi, har bólkurin byrjaði føroyska bylgju, sum ikki heilt hevur lagt seg enn. Ein bylgja, sum fleiri føroyskir bólkar síðan hava riðið á. Men Týr strevast framvegis og tað gongur væl, frættist í tíðindaskrivi frá umboðskvinnuni hjá Týr.

### Føstulávintskonsert í VB-húsinum

Týr spælir fastalávintskonsert í VB-húsinum 21. februar, fyriskipað av Vágs Bóltfelag. Týr spældi seinast í VB-húsinum í novembur 2003 og hetta var tann konsertin, har áhoyrararnir best kendu tónleikin og øll sungu við. Gott er at spæla í Føroyum og eru Føroyar góður grundvøllur til at fara út í heimin.

Arbeiðið hjá Týr at koma út í heim gongur støðugt framá og Týr spælir í Tyskland í juli og í Russlandi í september á festivalinum Karelian Faces í Petrozavodsk, Skandinavisku festivalinum í Moskva og eisini skipar bookingfelagið Bomba Piter fyri konsertum í St. Pætursborg. Umboðið hjá Týr, Sigrid J. Dalsgaard, hevur fingið heiðurin at finna 2 aðrar norðurlenskar bólkar til tiltøkini í Russlandi, tíverri fyri føroyskar tónleikarar, skulu hesir bólkar vera úr øðrum norðanlondum enn Føroyum.

### Góður stuðul úr Føroyum

Norðurlandahúsið hevur longu kunngjørt, at tey stuðla konsertferðini hjá Týr aftur, og er hetta stór hjálp. Vit vilja takka Norðurlandahúsinum fyri aftur at stuðla Týr. Atlantic Airways stuðlar Týr støðugt og eisini stuðla teir komandi føstulávintstiltakinum, hjartans tøkk til Atlantic Airways.

Nógvir ummælarar og fjølmiðlafólk eru ovfarin av, at Týr hevur spælt so nógva staðni og hetta hevur verið gjørligt við góðum stuðli frá føroyskum mentanarstovnunum og vinnulívinum.

### Heimsumfevnandi licens-avtalu

Týr hevur fingið boðið license-avtalu fyri allan heimin frá eysturríkska plátufelagnum Napalm Records. License-avtalan er fyri Eric the Red við møguleika fyri trimum fløgum afturat og tá skal Napalm Records gjalda upptøkuútreiðslurnar fyri næstu fløgurnar. Napalm Records hevur gott fótafesti í metal-heiminum og kann fáa fløgurnar hjá Týr út á heimsmarknaðin. Tó er ikki avgjørt um Týr tekur av hesum boðnum frá Napalm Records, tí tað eru nøkur fíggjarlig øki, sum partarnir ikki eru samdir um. Hetta er tann fyrsta avtalan av sínum slag, sum Týr hevur fingið í boðið og vit hava tískil eisini hug at vita, hvat onnur feløg kunnu bjóða bólkinum. Væntandi koma nógv metal-plátufeløg til festivalirnar Headbangers Open Air og RockTown í Týsklandi í summar og kanska spyrst okkurt burturúr har.

Boð um license-avtalu til Eric the Red kemur heldur óvæntað, tí tað er ikki vanligt at fáa bjóðað license-avtalu, tá fløgan er so nógv ummæld sum Eric the Red er (minst 50 ummælir, øll góð) og tá hon longu hevur fingið útgevarar í license-økinum. Væntandi metir Napalm Records hetta vera eina góða framtíðaríløgu.

License-avtalan og konsertferðin 2004 er úrslit av dúgligari marknaðirføring av Týr í bløðum, á internetinum og á útvarpsstøðum. Marknaðarføringini av Týr hevur umboðið Sigrid J. Dalsgaard staðið fyri.

Áðrenn Týr fara aftur út í heim, verður føstulávintskonsert 21. februar, fyriskipað av Vágs Bóltfelag. Vit gleða okkum at spæla suðri í Vági aftur, siga Týr í tíðindaskrivi.

# Brimil sleipaði Polarstjørnuna á Klaksvík

SLEIP
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinasta fríggjamorgun klokkan 06.00 kom vaktarskipið, Brimil, á Klaksvík við línuskipinum, Polarstjørnuni.

Polarstjørnan var stødd í ein landnyrðing úr Fugloynni, tá ið teir hóskvøldið í síðstu viku noyddust at biðja um sleip, tí koplingin sveik.

Klokkan 21.45 hóskvøldið stevndi Brimil á leiðina, har Polarstjørnan var, og stívliga 8 tímar seinni vóru skipini bæði á Klaksvík.

Sum skilst, hevði Polarstjørnan verið rættiliga stutt á fiskileið, tá ið teir noyddust at bróta túrin av.




*Seinasta fríggjamorgun kom Brimil á Klaksvík við línuskipinum, Polarstjørnuni, sum hevði trupulleikar við koplingini*




# Dollarin á lægsta stigi

Sum væntað gjørdist farna vika óstøðug á altjóða virðisbrævamarknaðunum. Ein av orsøkunum var økta hallið á amerikanska handilsjavnaðnum, ið fekk stóra ávirkan. Eftir at kunngjørt var, at handilsjavnahallið í desembur øktist úr 38,4 í 42,5 milliardir dollarar, viknaði dollarin aftur munandi. 100 dollarar kostaðu farna fríggjadag 577,96 krónur og hetta er lægsta virði síðani 1996. Samstundis var dollarin á lægsta stigi mótvegis evruni nakrantíð.

Aðra orsøk til óstøðugu vikuna átti sum væntað tjóðbankastjórin í USA Alan Greenspan. Greenspan var í røðu síni mikudagin 11. januar sum heild bjartur um teirra búskap, men av tí at hann undirstrikaði tolsemið hjá bankanum viðvíkjandi komandi rentuhækkingini, lækkaðu lánsbrævarentur og partabrøv hækkaðu. Ikki fyrr enn dagur meira neyvt kann setast á komandi rentuhækkingina, kann hugsast at dollarin av álvara fer at styrkjast aftur.

Roknskapirnir kunngjørdir í farnu viku gjørdust misvísir. Inntøkurnar hjá TeliaSonera gjørdust góðar, men m.a. kunngerðin um einans at rinda úr 1 krónu í vinningsbýti og ætlanin um at keypa onnur virkir, fingu kursin at lække.

Hóast inntøkurnar hjá Philips gjørdust lægri enn væntað, er raksturin nú lønandi mótvegis 2001 og 2002, sum góvu hall. Philips stjórin er samstundis bjartskygdur, og hetta fekk Philips at hækka kunngerðardagin.

Teldufyritøkan Dell kundi vísa á góðan roknskap og bjartar metingar, meðan roknskapurin hjá Electrolux gjørdist eitt vónbrot. Hesa vikuna kunngerða m.a. Norsk Hydro, Nordea, Svenski Handilsbankin og Carlsberg.

Roknast kann við, at hendan vikan verður friðarlig sammet við farnu viku, ið var merkt av stórhendingum. Mánadagin 16. var frídagur í USA og avmarkað er við búskaparligum kunngerðum. Burtursæð frá roknskaparkunngerðunum verður kunngerðin av prírsvøkstrinum í USA fríggjadagin millum áhugaverdastu hendingarnar. Prísvøksturin hevur serliga ávirkan á longru lánsbrøvini og um prísvøksturin verður lágur kunnu long lánsbrøv fara at standa seg væl.

**Rentur**

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,60% | -0,03% |
| 5 ára lánsbræv | 3,62% | -0,03% |
| 10 ára lánsbræv | 4,29% | -0,01% |

**Partabrævavísitøl**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 276,3 | 1,2% |
| OMX, Svøríki | 688,5 | -0,4% |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2.712,2 | -0,6% |
| S&P 500, USA | 1.145,8 | 0,5% |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 108,97 | 0,2% |
| Evru Lánsbrøv | 165,38 | 0,1% |
| Norrøn Partabrøv | 79,03 | 0,1% |
| Altjóða Vøkstur | 62,32 | 0,0% |

**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 583,86 | -0,5% |
| EUR | 745,09 | 0,0% |
| GBP | 1.102,45 | 1,0% |
| NOK | 84,85 | -1,0% |

*Renta og kursir kl. 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*